Jan Ziskasen, komandi stjórin í Føroya Tele saman við Angus MacNeil úr Suðuroyggjum/Hebridunum og limur av bretska parlamentinum og eisini formaður í Føroyanevndini har. Mynd Jan Müller/oljan.fo

# Nýggi telestjórin vitjan úr bretska parlamentinum

**Jan Müller**

05.10.2015 - 16:37

Oljan.fo

Hóast hann ikki enn fult og heilt hevur tikið við sum stjóri í eini av Føroya størstu fyritøkum, so nýtti komandi stjórin í Føroya Tele, Jan Ziskasen, í morgun høvi til at taka ímóti einum rættiliga framstandandi parlamentslimi úr London, nevniliga skotanum og formanninum í Føroyanevndini í bretska parlamentinum, Angus Brendan MacNeil, ið er á stuttari vitjan í Føroyum.

Við sína lið hevði Jan Ziskasen eisini ein av slóðbrótarunum fyri vaksandi samvinnu millum Føroyar og Stórabretland, stjóran í FT Net, Páll Vesturbú. Honum og øðrum góðum starvsfólkum fyri at takka, hevur tað eydnast umvegis Shefa-fjarskiftiskaðalin at knýta verulig sambond millum føroyska og skotska vinnu og myndugleikar. Millum tjóðirnar báðar. Hesin kaðal verður í dag brúktur av fleiri av heimsins størstu oljufyritøkum, BP og Total, í teirra arbeiði vestan fyri Hetland, umframt at hann í dag eisini hevur týdning fyri samfeløgini har norðuri í Skotlandi og er við til at tryggja teimum skjótt og gott internet- og breiðbandssamband. Bara framtíðin veit at siga, hvat hetta samstarv kann mennast til.

Eingin ivi er tó um, at við tí nýggja stjóranum á Føroya Tele, sum kemur heimaftur úr “útlegd”, har hann hevur staðið á ovastu rók í heimskendari fyritøku við skrivstovu í amerikonskum stórbýi, fer okkara samband og samstarv við stóra bretska grannan fyri sunnan at verða ment og útbygt.

At týdningarmikil skotskur politikari í bretska parlamentinum vitjar er ikki til at undirmeta, ikki minst nú fast rutusamband er millum Vágar og skotskan stórbý. Vitanin um hesa rutuna er gull verd fyri bæði londini, tí hon skapar nýggjar møguleikar fyri samvinnu bæði á vinnu- og á mentanarøkinum.

Tann sannroynd at ætlanin at stongja føroysku sendistovuna í London varð slept í evstu stund hevur heldur ikki so lítið at siga, tá hugsað verður um framtíðar samvinnuna. Tað er tí sera hugaligt, at sjálvur formaðurin í Føroyanevndini í parlamentinum, av sínum eintingum tekur stig til at vitja í Føroyum bæði fyri at hitta vinfólk eins og at menna verandi sambond og knýta nýggj.

Her er tað eisini so upplagt, at ein fyritøka sum Føroya Tele gongur á odda, nú hon hevur gingið undan at troyta møguleikarnar, sum liggja í grannalagnum. Øll orsøk er tí til at ynskja komandi

stjóranum, sum fer at byggja sítt arbeiði á herðarnar hjá tí fráfarandi, Kristian Davidsen, góða eydnu við spennandi arbeiðinum.

Bretski parlamentslimurin nýtti eisini høvi undir vitjan síni í høvuðsstaðnum at støkka inn á gólvið á skrivstovuni hjá oljufelagnum Statoil. Har hitti hann stjóran Rúna M. Hansen, sum eisini er leiðari av arktisku deildini hjá Statoil. Teir prátaðu um leitingina við Føroyar og um orkuspurningar sum heild.



Angus MacNeil saman við Joannes V. Hansen frá uttanríkistænastuni í Tinganesi. Myndir Jan Müller, oljan.fo







Jan Ziskasen, Angus MacNeil og Páll Vesturbú





Angus MacNeil vitjar Statoil-stjóran Rúna M. Hansen.

